# Heri er svakur

**Heri Jacobsen er Havnarmaður við stóra H. Hann heldur við Kvívíkingi og hevur eitt umdømi sum tann býtti, lívligi útvarpsverturin, sum tosar um g-streingir og tálgaknettir, og sum av mongum man verða skýrdur sum eitt sindur svakur**

SAMRØÐA
*Ingrid Bjarnastein*

Vit kenna hann øll. Ella kenna og kenna. Vit vita, hvør hann er. Hann eitur Heri Jacobsen og er útvarpsvertur. Hann hevur í fjørsummar og í summar verið at hoyra í Útvarpi Føroya í summarsendingini, Barometrinum.

– Ja, eg eri havnarmaður við stóra H, men eg haldi við Kvívíkingi, sigur tann fryntligi og fyrikomandi útvarpsverturin, Heri Jacobsen.

Hann greiðir frá, at hetta er nakað, sum er komið av, at mamma hansara er úr Kvívík, og heilt frá hann var lítil, so hevur hann hoyrt, hvussu mamman hevur rópt og skrálað eftir Kvívíkingi í stovuni, meðan kappróður hevur verið.

– Hetta er nakað, sum er komið av móðursrópi, sigur Heri, og flennur.

– Men eg havi roynt at slitið meg frá tí, og roynt at hildið við havnarbátunum, ella um ikki annað hildið, at teir bátarnir vóru penir. Men tað ber ikki til. Hasin ljósablái liturin og bátarnir hjá Kvívíkar Sóknar Róðrarfelag eru teir eg altíð fari at halda við.

Men annars er Heri so nógv havnarmaður, sum man kann verða. B36´ari og spælir í Havnar Hornorkestri.

## Býtt og klókt

– Summi halda, at tú ert havnarmaður, tí tú sigur »havnamævir« og tosar sum fólkini í Havn. Eitt gott dømi er Niels Finsen. Danir siga, at hann er fyrsti danin, sum fekk Nobelvirðislønina, men tað passar ikki. Hann er ikki dani. Hann er »havnamævir«, heldur Heri, meðan hann stórflennir, við eyðkenda látrinum, sum vit so mangan hava hoyrt í summar.

Heri hevur fingið eitt »image« sum tann býtti og tápuligi útvarpsverturin við teimum býttu spurningunum um g-streingir og tálgaknetti. Og tað munnu vera mong, sum halda, at havnarmaðurin er eitt sindur smásvakur.

– Mítt image var ikki við vilja. Tað var einaferð í fjør í byrjanini av Barometrinum, at eg kom til at siga okkurt uppá ein býttan máta. Kári kom so at virka sum tann, sum altíð skal bera í bøtuflaka fyri tann býtta og tápuliga Hera. Og hesar leiklutirnar hava vit spælt fult út líka síðani, greiðir Havnarmævirin frá.

– Eg vil vera tann býtti. Kári er tann, sum ger seg smáklókan uppá alt møguligt. Streym, seyð, útróður og so víðari, meðan eg flenni býtt.

Alt summar hevur Barometrið verið í luftini og teir hanga í eina tíð afturat, so tað krevur nógva orku og góðan hug til útvarp fyri at megna at fylgja við.

– Tað er als ikki strævið. Tað kemur av sær sjálvum. Tú kanst gott hava sovið illa um náttina, ella sovið lítið og ganga og hanga, men so skjótt tær fyrstu trummurútmurnar í eyðkennislagnum hjá Barometrinum fara í gongd, so er tað sum tú fært eina adrenalinsproytu í endan, og so er tað »game on« inntil sendingin endar.

Spurdur um tann mest minniliga túrin við Barometrinum hevur útvarpsverturin ilt við at geva eitt greitt svar.

– Vit hava verið nógvastaðni. Vit hava flogið út til allar smáoyggjarnar í Føroyum, og tað er hvønn dag, at vit gera okkurt gott prát. Nú eru tær nýggjastu ferðirnar, so fríkastar í minninum, so tað eru tær vit minnast best, men tá vit skipa fyri evnisdøgum og so víðari, tá er tað altíð onkrir serligir dagar, sum koma fram, greiðir Heri frá, og leggur afturat, at tá Barometrið í fjør var í grótbrotinum í Norðragøtu og hevði eina paintballkapping millum Dimmalætting, Sosialin, Sjónvarp Føroya og Útvarpi, man vera ein tann minniligasti evnisdagurin.

## Lata væl at

Fólk lata sum heild væl at Hera og sendingini, sum heild.

– Responsurin frá fólki er góður sum heild. Tá eg eri í býnum ella práti við fólk onkustaðni, sum er tað altíð positivt, men tú kanst ongantíð gleða øll. Tú traðkar altíð onkran yvir tærnar, sigur Heri.

– Men fólk lata væl at, men tað er altíð onkur sum sigur, at Heri er bara for svakur.

Ólavsøkan stendur fyri durum, og hevur útvarpsmaðurin eina greiða mynd av, hvat skal vera á ólavsøku fyri tað skal vera ólavsøka.

– Eg spæli við Havnar Hornorkestri, og tað havi eg gjørt í yvir 20 ár. Um eg ikki marsjeri á ólavsøku ella spæli undir tinghúsinum, so er tað ikki ólavsøka fyri meg, sigur Heri Jacobsen, útvarpsvertur og svakur havnarmaður.

**Hvussu heldur tú ólavsøku?**

## Ólavsøkan skal haldast



*Helena Dam á Neystabø*

– Eg mær at halda ólavsøkuna, og tað verður eiki ótraditionelt á skránni. Børnini eru heima, so vit verða nakað saman við teimum, men vit verða eisini nógv úti.

Vit plaga at fara til kappróður, framsýningar, fótbólt, kabarett, hondbólt og annað. Og so fari eg til felagssangin ólavsøkudag. Tað er bara at vóna, at tað verður gott veður, men eg havi nú eisini staðið har í regni og vindi og sungið. Løtan er altíð góð, og tað mann vera eindømi, at so stórur partur av eini tjóð savnast friðarliga til at syngja sangirnar, sum vit eiga og skulu bera víðari.

Eg plagi at fylgja við tingsetuni, men nú eri eg ikki sjálv bundin at henni longur. Tað var eg í 12 ár, og hóast eg onkuntíð sakni tað politiska lívið, tí tað var sera spennandi, so er tað eisini gott at síggja heimin við eygunum hjá einum vanligum føroyingi.



*Heri Jacobsen er havnarmaður við stóra H. Summi vilja verða við, at hann er ein svakur havnarmaður*

*Mynd: Jens Kr. Vang*